# Miðvikan

Gunnvør Norðfoss:

# Heimsbardagin gjørdist hennara lagna

**Tað vóru nógvar føroyskar kvinnur, sum giftust við bretskum hermonnum, ið vóru her undir krígnum. Summir hermenn blivu verandi í Føroyum, meðan aðrir fóru heim til Bretlands við teirra føroysku konum. Ein teirra var Gunnvør Norðfoss úr Havn**

Nú 70 ár eru liðin síðan kríggið byrjaði, og 65 ár síðani tað endaði, er hetta liðið av føroyskum hermannakonum og teirra monnum farið at fækkast. Tí er umráðandi at lofta mest gjørligt av hesi søgu, meðan tað enn er møguligt.

Fyri kortum doyði Peter McGavin, sum var sagdur at vera seinasti av bretsku hermonnunum, sum blivu verandi í Føroyum.

Men enn er nokk so fitt av konunum og eisini av monnunum, sum liva eftir í Bretlandi. Vit hava í Miðvikuni havt eina røð við Jóhonnu Apol, sum giftist við Harry Wilson. Jóhanna doyði fyri kortum, meðan Harry livir eftir, gott 90 ára gamal.

Í august hittu við 86 ára gomlu Gunnvør, fødd Norðfoss úr Havn. Hon var komin heim í 90 ára føðingardag hjá beiggja sínum Jóhan, sum er kendur frá Miðvikuni fyri hansara áhugaverdu frásagnir frá sínum lívi. Hann kundi eisini geva eitt gott íkast til søguna hjá føroyskum fiskimonnum, sum sigldu undir krígnum. Tey bæði umboða tískil ein stóran part av okkara søgu frá hesi tíðini.

## Ættin úr Havn og av Eiði

Vit hittust úti við Gráastein heima hjá Johan og Emmy, har Gunnvør fortaldi sína søgu. Mamma hennara var Anna á Lofti, ættað av Eiði. Foreldur hennara vóru Súsanna og Sigmund á Lofti. Pápin var Albert, sonur Elspu og Dánjal í Horni í Havn. Søgan hjá Albert var eisini við í umrøddu røð í Miðvikuni.

Systkini vóru umframt Johan, eisini Olina, Bernhard, sum doyði lítil, Bernhard og Dánjal, sum býr í Danmark.

Gunnvør gekk í kommunuskúlanum, har Poul Jensen var stjóri. Poul var kendur fyri at kunna vera sera strangur. Men Gunnvør letur væl at honum. Kanska var hann blíðari við genturnar enn dreingirnar!

Gunnvør kom at búgva nógv hjá mostur síni Oluffu. Tað byrjaði við, at Gunnvør gekk ørindi fyri mostrina, sum var hølt og tí gongutarnað. Tað endaði við, at Gunnvør fyri tað mesta bleiv búgvandi hjá henni. Hini systkini komu eisini nógv til Oluffu.



*Eftir kríggið kom Norman aftur eftir gentuni í Føroyum, og tey giftust*



*Norman var ein flottur fýrur. Tað var ikki so løgið, at tey fulla fyri hvørjum øðrum*

Gunnvør hevur eisini uppkallað eina dóttir eftir Oluffu. Hon er einnevnd í Bretlandi, og tað er hon errin av. Oluffa dugur eisini væl at tosa føroyskt.

Gunnvør greiðir frá, at tað var hugnaligt at búgva mitt í Havnini. Eitt ítriv kundi vera at fara oman í Vágsbotni á seiðaberg. Tá kundi eisini fáast eitt bíligt kók.

Gunnvør dámdi væl tónleik og hetta gjørdi, at hon kom at ganga í sunnudagsskúlanum hjá Frelsunarherinum. Beiggjarnir Johan og Sigmund spældu eisini horn har.

Her var eisini skótaarbeiði og gjørdar vóru eisini útferðir, sum til Kaldbak. Frelsunarherurin gjørdist ein munandi partur av barndóminum hjá Gunnvør. Hon kom tískil at hava eitt varandi tilknýti til herin, eisini eftir at hon flutti til Bretlands.

Gunnvør gjørdi nógv av at ferðast norður til Eiðis at vitja ommuna og abban. Hon plagdi tá at svimja í Múlavík. Á Eiði plagdi hon eisini at fara til neyta og hoyggja. Eisini plagdi hon at vitja til Tjørnuvíkar, haðani Sannilena, kona mammubeiggjan Pedda, var ættað. Hetta var alt eitt gott lív hjá eini havnargentu.

## Stóra broytingin: Bretska hersetingin

Gunnvør var 15 ár, tá ið Føroyar



*Gunnvør sum vøkur ung genta á Havn*

vórðu hersettar í apríl 1940. Hon minnist dagin, tá ið fyrstu hermenninir komu á Havnina. Gunnvør var á kajuni, og hon fylgdi hermonnunum niðan í býin. Beiggin Johan var eisini á kajuni tá.

Tá var tað ikki í tonkunum, at hon skuldi fara at giftast við einum av hesum hermonnum!

Men lagnan vildi tað øðrvísi. Fyrsta arbeiðið hjá Gunnvør eftir at vera farin úr skúlanum var at arbeiða fisk yviri við Strond hjá Karl á Lag. Beint við á Skansanum kom bretski hermaðurin Norman Gartside at arbeiða saman við eini herdeild. Hann var sersjantur og hevði ábyrgd av kanónunum.

Tey bæði fingu so eygað á hvørjum øðrum og byrjaðu at koma saman. Tað kundi hugsast, at mammuni einki dámdi hetta. Men hon helt Norman vera so fittan og penan, at hon góðkendi henda nýggja sjeikin beinan vegin.

Men henda eydnan kundi tó enda skjótt, tí Føroyar vóru ikki eitt verandi stað hjá hermonnunum, sum komu higar. Teir skuldu ikki bert hugna sær í Føroyum, men skuldu eisini royna veruligt kríggj!

Eftir hálvt triðja ár mátti Norman fara avstað aftur. Eftir at hava verið eina tíð í Suðuronglandi, varð hann sendur til Palestina, sum tá var eitt øki, har Bretar høvdu ræðið. Her dámdi honum sera væl. Hann gjørdist kendur í so væl Jerusalem sum Gaza, sum seinni blivu og enn eru brennideplar í heiminum.

Tá var samskiftið ikki, sum tað er í dag. Sambandið teirra millum var við fjarriti og brøvum. Men annars roknaði Gunnvør ikki at síggja Norman aftur. Tað vóru jú so nógv dømi um slík sambond millum hermenn og føroyskar gentur, sum endaðu við ongum.

## Tá ið mjólk varð keypt í spannum

Aftaná at hava arbeitt í fiski fór Gunnvør at arbeiða á Meiarínum. Hetta var eitt av teimum heilt stóru arbeiðsplássunum í Havn. Stjóri var Carl Jensen, sonur tann legend-